# Føðingardagstilboð

**SONJA DESIGN**
Stoffalág 41 • 100 Tórshavn • Tel. 314979
(Oman fyri Lágargarð)

**Í morgin fríggjadagin 30. nov. lata vit -20% av øllum vørum**

Kom inn á gólvið og finn tað rætta jólastásið ella jólagávuna til hennara
Vit hava eisini stórt úrval av meturvørum og prýðislutum nú til jóla

| | |
|---|---|
| Mánadag-hósdag | kl. 10.00-17.30 |
| Fríggjadag | kl. 10.00-19.00 |
| Leygardag | kl. 10.00-14.00 |

Sosialurin - 311820


## Prutl við skaða til sølu

**Merki:** Atala Skeggia
**Árg.:** Okt. 2001
**KM.:** 206

Prutlið verður selt sum tað stendur nú, og kann síggjast hjá SP/F C.N. Bygg, Heiðarnar, FO 950 Porkeri.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Tlf. 373890
Fax. nr. 373117
Fartelefon 224859
at hitta millum kl. 08⁰⁰–10⁰⁰
Magnus E. Joensen
Sýnsmaður


# Snikkaravirkið í Marknagili

• vindeygu
• trappur
• annað snikkaraarbeiði

Tel 31 17 23 • 21 17 23


## Søkt verður hervið eftir einum

## Starvsfólki

at arbeiða fulla tíð, til alt fyrifallandi arbeiði hjá Viðareiðis Kommuna.

Viðkomandi, sum settur verður, kemur m.a. at umsita og viðlíkahalda ognir og alla útgerð, sum kommunan eigur.

Fólk við tekniskum/handverksligum førleika hava fyrimun, men er tað ongin treyt.

Kommunan ynskir, at viðkomandi starvsfólk, sum sett verður, er ágrýtið, sjálvstøðugt og tekur stig til at arbeiði verða framd í verki.

Løn sambært avtalu ella við avvarðandi yrkisfelag.

Skrivligar umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Kommunustýrinum í hendi *í seinasta lagi tann 17. desember 2001.*

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til

**Viðareiðis Kommunu**
tlf. 451083 (223563), fax 451094
E-mail: vid.kommuna@kallnet.fo


BÝIN


## Prutl við skaða til sølu

**Merki:** Derbi Predator
**Árg.:** Sept. 1999
**KM.:** 3,035

Prutlið verður selt sum tað stendur nú. Og kann síggjast hjá SIGMA IMPORT v/ Sigmund Olsen, FO 950 Porkeri.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Tlf. 373890
Fax. nr. 373117
Fartelefon 224859
at hitta millum kl. 08⁰⁰–10⁰⁰
Magnus E. Joensen
Sýnsmaður


Høvuðsreingerð
Frá A til Z til
Fyritøkur, Stovnar, Skúlar, Privat, Skip
Teppireins, Bona G lv,
Fastar avtalur til vinnulívið
Vaskarí & Reingering
Kvalitets reinger s ani 198
Tel • 21 13 12 • 31 63 00

Manhattan PUB & CAFE
Hóskvøld & fríggjakvøld
Livandi tónleikur
One strøm band
Manhattan PUB & CAFE
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96





Almadan
Lágprísmøbil við góðari dygd, er á goymslu
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • Tel. 44 75 60 • Fax 44 84 60


## Eysturingar - Endurtøkuskeið

*Skalt tú til eftiransandi roynd ella taka koyrikort aftur.* Endurtøkuskeið byrjar mánadagin 3. desember kl. 17-19.
Skeiðið varir í umleið 15 tímar. Endalig teoriroynd ætlandi 12. desember

**Eysturoyar Teoriskúli**
**Johan Beder, tel. 210 821**
**Ole Lykke, tel. 220 972**
**Hugo Kristiansen, tel. 225 225**

Sosialurin - 311820


# Øll hava eina góða síðu – vit hava pop.fo




STARV Sosialurin

# Sosialinum tørvar blaðfólk

Sosialurin fer í næstum at víðka um virkisøkið, har dentur verður lagdur á at skriva tíðindi til internetið. Ein alsamt vaksandi partur av tíðindaflutninginum fer um internetið, og fara vit nú at veita lesarum okkara eina enn betri tænastu á hesum øki við at dagføra tíðindini á internetinum allan dagin.

Uttan dugnalig starvsfólk ber ikki til at menna fyritøkuna, og tí hava vit brúk fyri at økja um redaktiónina sum skjótast, soleiðis at orka verður til at taka sær av tíðindunum á internetinum.

Vit bjóða tær eitt hendingarríkt og fjølbroytt starv, har tú verður partur av eini vælvirkandi og livandi redaktión, og tú sleppur at royna teg við alskyns uppgávum.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving ella journalistiskum royndum hava fyrimun. Tað er ein treyt, at tú dugir at orða teg lætt og neyvt á føroyskum, og at tú fylgir væl við í tí, sum hendir og rørist í samfelagnum.

Sosialurin er eitt blað, har tað hendir nakað. Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast okkum innan leygardagin 1. desember 2001:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Viðmerkjast skal »umsókn«

Hevur tú hug at frætta meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra, á telefon 211820 ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra, á telefon 216409

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna.

KPMG

# Bókhaldari

Fyri ein av kundum okkara verður søkt eftir bókhaldara at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Starvið, sum er eitt fulltíðarstarv, fevnir um alt vanligt bókhaldsarbeiði. Bókhaldsskipanin Navision Financials verður nýtt.
Talan er um eitt avbjóðandi og áhugavert starv.

**Umsøkjarin**
Tann, sum settur verður, skal hava kunnleika til bókhald, kunna arbeiða sjálvstøðugt og annars verða fyrikomandi og fryntligur.
Kunnleiki til bókhaldsskipanina Navision Financials, er ein fyrimunur, men eingin treyt.
Lønin verður sett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 10. desember 2001.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Rúna Poulsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn
Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo E-mail: kpmg@kpmg.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Kunngerð

Eykabýráðsfundur verður hósdagin 29. november 2001, kl. 18.00.

**Tórshavnar býráð**

SNARSKIVAN


Restorffs ASSU


**Fiskimálastýrið**
*Sjóvinnufyrisitingin*

# Umbýti av sjóvinnubrøvum

Sjóvinnufyrisitingin vil minna á, at tey sjóvinnubrøv (útgivin fyri 18. juni 1999), sum geva rættindi sum yvirmaður umborð á einum handilsskipi í altjóða sigling, skulu í **seinasta lagi 1. februar 2002** vera skift út til tey sokallaðu STCW-95 sjóvinnubrøv.

Treytirnar fyri at fáa tey nýggju sjóvinnubrøvini eru:

Navigatørar:
- prógv fyri loknað útbúgving á sjómansskúla
- siglingarbók ella aðra váttan um siglingartíð við handilsskipum
- galdandi heilsuprógv fyri sjófólk
- GMDSS-GOC ella ROC-prógv
- passmynd
- navigatørar, ið hava staðið skipara- ella stýrimansprógv fyri 1991, skulu harafturat hava lokið skeið í vandamiklum farmi og radar-simulatorskeið
- ARPA-simulatorskeið

Maskinmeistarar:
- prógv fyri loknað útbúgving á maskinmeistaraskúla
- siglingarbók ella aðra váttan um maskintænastu umborð á fiski- ella handilsskipum
- galdandi heilsuprógv fyri sjófólk
- passmynd

GMDSS-Radioprógv til nýtslu umborð á handilsskipum í altjóða sigling:
- galdandi GMDSS-GOC ella GMDSS-ROC prógv frá Radioeftirlitinum
- galdandi heilsuprógv
- passmynd

Teir navigatørar, sum ikki hava staðið radarsimulatorskeið ARPA, fáa árit um, at sjóvinnubrævið ikki gevur rættindi umborð á skipum, sum hava hesa útgerð.

Viðkomandi má persónliga møta upp eftir nýggja sjóvinnubrævinum fyri samstundis at undirskriva hetta.

**Kravt verður ikki, at teir persónar, sum sigla við fiskiskipum, skulu umbýta síni sjóvinnubrøv.**

Víst verður annars til kunngerð nr. 50 frá 12. mai 1999 um sjóvinnubrøv og útbúgvingarkrøv til sjófólk. Eisini ber til at fáa fleiri upplýsingar á heimasíðuni hjá Fiskimálastýrinum, www.fisk.fo

*Tórshavn tann 23. november 2001*
**Sjóvinnufyrisitingin**
Yviri við Strond 19
100 Tórshavn

## Lítil lastbilur til sølu

Toyota Dyna 150, árg. 90, til sølu fyri 35.000 kr.

**Tlf. 221176**

## Bakaralærligur søkist



**BAKARÍIÐ Mylnan**
Postboks 3334
FO-110 Tórshavn